# Bilar

Nr. 96 • hósdagur • 22. mai 2003 • 77. árg.




*Á grúsvegi er eitt stórt dustskýggj aftur úr bilunum. Myndin er tikin uppi við Sornfelli*

# Modellbilarnir koyra upp til 60 km/t

**At vaksnir menn hava sum ítriv at fáast við modellbátar- og flúgvarar, síggja vit javnan á Velbastaðhálsi, har Tórshavnar RC-felag hevur bæði flogvøll og havnarløg. Í løtuni verður ein breyt gjørd til modellbilar uppi við Kleynisvarða**

MODELLBILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Hesir koyrdu á Glyvursnesi seinasta hóskvøld, f.v. Eyðun Vestergaard, Birgir Simonsen, Brandur Johansen, Bartal í Gongini, Eyðun Simonsen, Bjartur Vestergaard og René Hjaltalin*

Hóast fólk hava ymiskar meiningar um tað, at vaksnir menn "spæla" við modell -leikur, er tað ein sannroynd, at flest øllum dáma sera væl at síggja teir snotuliga modellbátarnar- og flúgvararnar, sum tá t.d. limirnir í Tórshavnar RC-felag hugna sær á Velbastaðhálsi ella t.d. til RC-framsýning á ólavsøku í Svimjihøllini í Gundadali.

Nú vísir tað seg, at áhugin fyri skjóttkoyrandi modellbilum eisini er vaksandi. Vit vóru á Glyvursnesi seinasta hóskvøld, tá nakrir havnarmenn góvu sínum bilum alt tað teir áttu, bæði á grúsvegi og á ósløttum undirlendi. Bilarnir koyrdu við upp til 60 km/t. Á grúsvegnum varð eitt stórt dustskýggj aftur úr bilunum, eins og á "ordiligum" bilum. Tað sum er so áhugavert við hesum bilunum, serliga "offroadarunum", er, at teir uttan stórvegis trupulleikar kunnu koyra í haganum ella har sum undirlendi er óslætt. Bilarnir eru fjarstýrdir og motorarnir eru drivnir av brennievni, ið er ein blanding av methanol, olju og nitrometane. Motorarnir ljóða sum "ordiligir" bilmotorar.

## Áhugað finna saman

Tórshavnar RC-felag varð upprunaliga stovnað 18. mai 1976. Í dag eru umleið 80 limir í felagnum. Felagið hevur latið gjørt modellflogvøll við felagshúsið og sett eitt felagshús upp við Stórutjørn á Velbastaðhálsi. Um summarið eru venjingar við flogførum, bátum og bilum mikukvøld og um veturin eru venjingar leygar- og sunnudag - um tað annars viðrar. Eisini er ein RC-handil í Havn, tað er "The grand old man" innan RC-virksemi í Føroyum, Birgir Simonsen, sum hevur RC-handilin í Sílagøtu 4, telefon 312782. Byrjunarprísurin fyri bil og fjarstýring er góðar 3.000 krónur fyri ein vanligan bil, man fær eisini dýrari bilar og fjarstýringar, tá er prísurin frá umleið 6.000 krónum og uppeftir. Í løtuni verður ein breyt gjørd uppi við Kleynisvarða, oman fyri Havnina, til hesar bilarnar. Teir, sum koyrdu við modellbilunum á Glyvursnesi hetta kvøldið, søgdu, at teir høvdu varhugan av, at tað eru nógv fólk, sum eiga fjarstýrdar modellbilar, men ikki øll vita av hvørjum øðrum. Tí kundu teir hugsað sær, at tey kundu funnið saman til at koyrt við modellbilum ymsastaðni í landinum. Tey sum eiga ella ætla at ogna sær modellbilar, kunnu til dømis seta seg í samband við René Hjaltalin á tel. 214163.



*Birgir Simonsen í Havn hevði modellflúgvarar í 40-unum, langt áðrenn fjarstýringarnar komu á marknaðin. Umframt flúgvarar hevur hann eisini modell-skip og bilar og ein RC-handil*


Mini Cruise

galdandi alt summarsiglingarskeiðið

Fráferð hvønn mánadag kl. 8.30
við komu aftur á Havnina mikudag kl. 15.00

Á túrinum luttekur føroyskt orkestur





Njót okkara stásiliga luksusskip
við øllum tess hentleikum!

úr 800,-

Skipað verður m.a. fyri bingo á ferðini!



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




# Daewoo Kalos og Evanda komnir til landið



*Daewoo Kalos. Ein nýggjur bilur sum í fyrstu atløgu kemur sum hatchback við 5 hurðum. Ein væl nøgdur sølumaður, Jens Petur Jensen, sýnir her prísin á Daewoo Kalos*

**Seinastu árini hava vit ikki sæð nógvar nýggjar Daewoo bilar her hjá okkum, men nú er gongd komin á søluna aftur. Tvey nýggj modell eru komin á føroyska marknaðin, talan er um Kalos og Evanda**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eftir nøkur ár við óvissu um framtíðina hjá Daewoo, verður koreanska verksmiðjan nú stýrd av General Motors. Eitt nýtt felag, GM Daewoo Auto & Technology Company, er stovnað og samstarvið við GM sæst longu í ár. Ikki minni enn trý nýggj bilmodell koma á marknaðin í hesum árinum. Fyrsti bilurin í nýggja samstarvinum er Daewoo Kalos, ið er teknaður av italska bildesignaranum Giugiaro.

Kalos kostar frá 120.000 krónum, bilurin fæst við 1,2 litur motori við 63 hk og 1,4 litur motori við 83 hk, báðir bensinmotorar. Bilurin verður í fyrstu atløgu gjørdur sum hatchback við 5 hurðum, seinni kemur ein útgáva við 3 hurðum og ein sedan. Kalos hevur annars alla trygdarútgerð sum finst í nútímans bilum.

## Evanda avloysir Leganza

Umframt Kalos er eisini ein heilt nýggjur Daewoo Evanda, ið avloysir fyri tann størra Daewoo Leganza. Evanda er størri enn Leganza og er ein luksusbilur við hópin av útgerð sum standard. Motorurin er ein 2.0 litur við 131 hk. Prísirnir byrja við 230.000 krónum. Evanda eru komnir í tveimum útgávum. Í luksusútgávuni er talan um ein bil við leðursetrum og allari útgerð so sum klimaanlegg, band/fløguspælara við boks til 6 fløgur og alufelgur. Bilurin er stórur og rúmligur við góðum koyrieginleikum. Seinni í ár kemur ein heilt nýggjur Nubira.

Saman við MPV modellinum, Daewoo Tacuma, og tí minsta, Matiz, sum nú kemur við 1,0 litur við 4 syl. motori, hevur sølumaðurin hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali, Jens Petur Jensen, sera góð kort á hondum.

## Trabant endurburður



Trabant verksmiðjan, í fyrrverandi DDR, arbeiðir við eini verk-ætlan við einum Africar, ið verður ein bilur, sum skal verða einfalt uppbygdur og lættur at umvæla. Ætlanin er at bilurin skal framleiðast í Afrika. Gomlu Trabant bilarnir vórðu gjørdir í 3,3 mill. eindum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Magentis til Danmarkar



Kia Magentis, ið fyri tveimum árum síðan avloysti Kia Clarus, kemur seinni í ár til Danmarkar. Bilurin er í somu stødd sum Hyundai Sonata og kemur við 2.0 litur 4 syl. og 2,5 litur V6 motorum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Saab 9-2



Saab hava upplýst fyri amerikanskum tíðindafólkum, at ein Saab 9-2 kemur á marknaðin í USA og Canada næsta ár. Bilurin, ið verður væl minni enn Saab 9-3, verður fyrsti Saab við konstantum 4-hjólstrekki

*Kelda: Motor Magasinet*


VARPIÐ

20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna

Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2





EF007
**VW TRANSPORTARI DUP. KABIN**
Árg Apr-98, Km 75.000. Diesel.
Kr. 92.000 v/MVG.



GF193
**AUDI A4 1,6**
Árg Dec-95, Km 116.000. Bensin.
Kr. 119.000.



SF367
**BMW 316I**
Árg Dec-92, Km 169.000. Bensin.
Kr. 89.000.



YH254
**MITSUBISHI L200 STRADA**
Árg Aug-96, Km 124.000. Diesel.
Kr. 112.000.



F51856
**VW VENTO**
Árg Jun-95, Km 87.000. Bensin.
Kr. 92.000.



UD906
**MAZDA 323**
Árg May-96, Km 106.000. Bensin.
Kr. 59.000.

UD007
**TOYOTA STARLET 1,3**
Árg Jun-96, Km 152.000. Bensin.
Kr. 64.000.

Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net



YVIR-STÝRIMAÐUR
TIL MF NORRØNU

Søkt verður eftir yvirstýrimanni til Norrønu at byrja sum skjótast.
Viðkomandi skal ikki vera yvir 45 ár, skal hava hollar royndir sum yvirstýrimaður/ skipari við stórum skipum (yvir 10.000 BT) umframt øll prógv/skeið, ið krevjast til ferðamannaskip í altjóða sigling.
Umsóknir saman við avriti av prógvum og CV skulu stílast til stjórnina og vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 28. mai 2003.

SMYRIL LINE
Postboks 370
110 Tórshavn



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Nýggja Norrøna er 36.000 BT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".